

# Vælkomin á Summar Festival

Vit bjóða øllum føroyingum og útlendskum gestum vælkomnum á Summar Festivalin 2009, sum verður hildin í døgunum frá 6. til 8. august. Landsins størsti tónleikafestivalur er aftur til reiðar at bjóða tykkum eitt fantastiskt summarupplivilsi við tónleiki í heimsflokki í tríggjar dagar.

Millum pallarnar snýr tað seg um hugna, gott túnatos, mat, stuttligar løtur, prát við gamlar kenningar og felagsskap. Á pallunum verða heimshittini fleiri í tali enn nakrantíð áður. Summar Festivalurin hátíðarheldur jubileumsárið hjá Bee Gees – einum av mætastu tónleikabólkum í søguni – og eisini ABBA-fepurin, sum bara ikki vil fara niður, rakar Føroyar við stórslignum ABBA showi úr Svøríki. Og so er ikki at gloyma poppkongarnar Nik & Jay, sum halda veitslu á Vágsbøi hóskvøldið.

Hetta er sættu ferð, at Summar Festivalurin verður hildin í Klaksvík, og tað verið ein fantastisk ferð hesi árini. Tað byrjaði við einum miðalstórum festivali í 2004, har 3.500 fólk hugnaðu sær í fantastiskum summarveðri. Síðani hevur festivalurin vaksið seg stóran og sterkan, og upp í 10.000 fólk hava verið á festivali. Samanlagt hava eini 38.000 vitjandi verið á Summar Festivalinum hesi fimm árini, festivalurin hevur verið hildin. Og aftur í ár verður roknað við fullum húsi til kanska besta festivalin nakrantíð.

Á pallinum hava verið nógvar stórar og minniligar løtur verið á undanfarnum. Lagt var til brots við eitt nú legenduni Ken Hensley, og síðani hava bólkar sum The Scorpions, Roger Hodgson, The Rasmus, Shakin Stevens, Brian McFadden, Alphabeat, Melanie C, Smokie, Brian Rice, Boney M, Johnny DeLuxe og fleiri onnur vitjað festivalin og givið okkum stórar løtur og framúrskarandi tónleik.

Føroyskur tónleikur hevur altíð staðið sterkur í myndini á Summar Festivalinum. Fólk hava kunnað upplivað ekkó frá fortíðini við comebackkonsertum hjá fólkakærum bólkum. Tað hevur eisini borið til at hoyrt teir populerastu bólkarnar í landinum, og møguleiki hevur eisini verið at uppliva tað nýggja og framrættaða.

Summar Festivalurin er fyri fólk í øllum aldri. Hetta er tann hugnaligi festivalurin við teimum stóru upplivilsunum. Á pallinum undirhalda heimskendir tónleikarar og tónar saman við tí besta føroyska. Og á gøtum, bøi og torgi syrgja fólk sjálvi fyri hugnanum og teimum góðu løtunum. Vit ynskja tykkum øllum ein góðan Summar Festival.

**Summar Festivalurin**

Serblað í sambandi við Summar Festivalin 2009 – Útgevari: Sosialurin – Prent: Prentmiðstøðin – Borið í hvørt hús í landinum